**Ætlanaryvirlýsing millum
Donsku stjórnina og Føroya landsstýri
um at lata føroyingum Íleggingargrunnin fyri Føroyar**

Løgmaður hevur sett fram ynski um, at Íleggingargrunnurin fyri Føroyar kemur á føroyskar hendur.

Danska stjórnin og Føroya landsstýri hava, á fleiri økjum, eitt tætt, gott og konstruktivt samstarv, og ynski er um at styrkja samstarvið enn meira. Stjórnin og landsstýrið hava sama stevnumið, nevniliga at Føroyar í størst møguligan mun fáa fult ræði á viðurskiftum, sum viðvíkja Føroyum.

Danska stjórnin gongur tí ynskinum hjá Føroya landsstýri á møti, og fer at virka fyri, at grunnurin kemur á føroyskar hendur frá 1. januar 2025 at rokna, við eini broyting í lov om Investeringsfonden for Færøerne.

Keypmannahavn, hin 17. januar 2024

Mette Frederiksen
Forsætisráðharri

Aksel V. Johannesen
Løgmaður